


## Eitt avbjóðandi starv í heimsins mest spennandi alifelagi

Nú ið ógvisliga afturgongdin er steðgað, er Pan Fish farið undir eina broytingartilgongd, ið vit í eftirtíðini fara at vera stolt av. Komandi árini fer okkara vinnuvegur at uppliva ein áður ósæddan vøkstur í heimshøpi. Og vit eru við heilt har frammi!

Pan Fish hevur serligar avbjóðingar í Føroyum, og tí tørvar felagnum ein virkisfýsnan fíggjarstjóra skjótast gjørligt.

**Starvsøkið í Føroyum**
Virksemið hjá Pan Fish í Føroyum er skipað í fleiri feløgum, men øll umsiting er í Vestsalmon í Kollafirði. Tilsamans eru um 90 fólk í starvi í Føroyum. Felagið hevur heilt nýmótans framleiðsluskipan, og smoltini framleiðir felagið sjálvt. Harumframt eru aling, góðsking, marknaðarføring og søla á skránni. Alt hetta verður virkisøkið hjá nýggja fíggjarstjóra okkara í Føroyum.

**Fíggjarstjórin skal:**
- vera siviløkonomur, ríkisgóðkendur grannskoðari ella hava samsvarandi formligan førleiki.
- hava týðandi arbeiðsroyndir (í minsta lagi fimm ár)
- hava leiðsluroyndir
- duga enskt ræði
- hava hollan kunnleika til norskar/danskar roknskaparreglur
- duga at seta handilsskap og væl grundaðar avgerðir í miðdepilin, tá ið fíggjarstýringin verður skipað
- hava áhuga fyri og royndir við strategiskum tilgongdum
- vera nóg naskur at seta atfinningarsamar spurningar
- duga væl at greina, taka avgerðir og laga seg til ymiskar umstøður

**Vit bjóða:**
- kappingarførar treytir
- spennandi avbjóðingar
- týdningarmiklan leiklut í leiðslubólkinum
- nógvar ymiskar uppgávur viðvíkjandi búskapi, gjaldføri, sáttmálum o.s.fr.
- altjóða starvsroyndir

**Umsókn, spurningar og freist**
Skrivlig umsókn, ið er merkt "fíggjarstjóri", skal sendast:

Pf. Vestsalmon
Postsmogu 82, 410 Kollafirði

Spurningar kunnu beinast til Frímund Hansen, stjóra, á telefon 477 000, fartelefon 210 592 ella við at senda teldubræv til frimund@vestlax.fo.

Freistin at søkja er 7. novembur 2003.

*Frameftir fer Pan Fish eina mest at fáast við laksaaling. Pan Fish alir laks og síl í Noregi, Føroyum, Skotlandi, USA og Kanada. Við munandi íløgum í framleiðsluorku og førleikamenning seinastu mongu árini, hevur Pan Fish ment seg til eitt av heimsins størstu og leiðandi laksaalifeløgum. Í 2002 vórðu framleidd umleið 100.000 tons av atlantslaksi í alibrúkum, ið Pan Fish antin eigur ella eigur part av. Kjarnuvirksemið í felagnum fer frameftir at snúgva seg um at framleiða smolt, ala, taka, góðska og selja fisk, ið felagið sjálvt hevur framleitt. Í kjarnuøki felagsins er eitt av endamálunum at gerast lágprísframleiðari og samstundis at seta sær fyri at hækka virðið við røttum søluætlanum. Virkissamtøkan hevur høvuðssæti í Stavanger í Noregi.*

Pan Fish

VESTSALMON

Sansir 355355

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg

AUTO-TEK
· Heilársdekk til flest allar bilar
· Lyktakanning · Oljuskift
Vit umvæla tryggingarskaðar
og klárgera til sýn
Sera sámuligir prísir
AUTO-TEK
ARGJABOÐAGØTA 5 · TEL 321206 · 221006
Sosialurin 341800

## Lærari

Søkt verður eftir lærara at byrja beinanvegin.

Talan er um eitt fulltíðarstarv restina av skúlaárinum.

Lærugreinirnar eru hesar: kunningartøkni, alisfrøði, evnafrøði og ítróttur við dreingjum – allar lærugreinir í 8.–10. flokki.

Møguligar umsóknir skulu vera **Felagsskúlastýrinum v/ Mariu í Skorini, 470 Eiði,** í hendi í seinasta lagi kl. 12.00 hósdagin 6. november 2003.

**Felagsskúlin á Oyrarbakka**

## Honda Accord 18i

Km. 85.000. Nýsynaður. CD-spælara o.a.
Sera væl hildin, ein eigari.
Prísuppskot kr. 110.000,-.

Áhugað ringið **543041**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3260, Sp/f 06.11.2001, 100 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:** 04.06.2003.
Nýtt navn: Sp/f J & K Betong
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Ragnhild Arnóra Petersen, á Túgvu 1, 100 Tórshavn.
**Innkomin sum stjóri:** Stein Olvur Petersen, Kristiansgøta 35, 188 Hoyvík.

*Skráseting Føroya tann 29. oktober 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 754, Sp/f 23.10.1997, 100 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:** 04.06.2003.
Kapitalur:
Hækking við kr. 20.000,00 til kr. 100.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 20.000,00 við skuldarumskifti til kurs 2.454,24.

*Skráseting Føroya tann 29. oktober 2003*

*Kristin Balle*

Sosialurin -har tað hendir



## HB 100 ár

Eigur tú nøkur gomul filmsklipp og/ella gamlar myndir av HB?

Komandi ár fyllir HB 100 ár, og tí fregnast vit eftir, um tú hevur onkran film ella myndir av HB liggjandi. Alt hevur áhuga. Serliga eru vit áhugaði í myndum frá 1955-1990, men alt annað viðkomandi tilfar (íroknað myndir) hevur eisini okkara áhuga.

Latið okkum bara frætta, og latið okkum gera av, um tilfarið er áhugavert.

Tú kanst seta teg í samband við Alexander Gaard Joensen á 214419 ella Niels Juel Arge á 522120 ella onkran annan nevndarlim/álitisfólk í felagnum. Sjálvsagt ber eisini til bara at senda okkum tilfarið til: HB, Gundadalur, 100 Tórshavn.

HB 1904

**Havnar Bóltfelag**

HESTPRENT · TEL. 314 555

## Skopunar Kvøldskúli

Treytað av nóg stórari undirtøku og góðkenning myndugleikanna, verða hesi skeið í vetur 2003/2004:

| Lærugrein | Tíð | Staður | Lærari |
|---|---|---|---|
| Tekning og máling | Eftir avtalu við læraran | Skopunar skúli | Einar Joensen Tlf. 361624 |
| Seyming | Eftir avtalu við læraran | Skopunar skúli | Jóhanna Ø. Hentze Tlf. 361190 / 263673 |




Føroya Bjór

# CUP

## Firma- og oldboyskapping í fótbólti í Runavík

Leygardagin 8. november skipar Tofta Ítróttarfelag fyri firma- og oldboyskapping í Runavík.

Tey sum ætla sær at vera við til kappingina vera biðin um at boða frá luttøku á telefon **222202, 225940** ella á teldupost **niclas@fmf.fo**. Seinasta freist at boða frá luttøku er hóskvøldið 6. Nov kl. 22:00.

Treytirnar fyri at vera við í firmakappingini eru, at leikararnir á liðnum arbeiða á sama virki. Tað vil siga, at leikarar kunnu koma frá fyritøkuni ella deild hjá fyritøkuni. Hvørt lið hevur bert loyvið til at hava tveir leikarar, sum hava spælt í 1., 2. ella 3. deild seinasta kappingarár.

Fyri at vera við í oldboyskappingini, skal leikari vera fyltur 35 ár og leikararnir á liðnum nýtast ikki arbeiða á sama arbeiðsplássi. Hvørt lið hevur bert loyvið til at hava ein leikara, sum hevur spælt í 1., 2., ella 3. deild seinasta kappingarár.

**Kappingartreytirnar eru annars hesar:**
- 5 leikarar eru á hvørjum liði. 4 útileikarar og ein málmaður.
- loyvt er at hava ein eykaleikara
- luttøkukostnaðurin er 300 kr.
- liðini í firmakappingini bera heiti eftir arbeiðsplássinum.

Við vón um stóra undirtøku.

Tofta Ítróttarfelag

B 68

Sosialurin 341800

HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL

*Allan november-mánaða!*

**VÁGA PIZZA**



*Frítt val
úr okkara pizzamenu*

**2 fyri 100,-**

*Bíleggið á tel 33 29 55 - vit koyra eisini út!*

HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA
SØRVÁGUR
TEL 33 29 55 · FAX 33 23 10 · T-Postur: hotel@ff.fo